# Göran Persson tosaði ókeypis

Síðani Gøran Persson fór frá sum svenskur forsætisráðharri, hevur hann eins og Bill Clinton ferðast víða og hildið fyrilestrar aftur fyri eina munagóða samsýning. Í vikuni var hann í Reykjavík. Tað var felagið hjá íslendskum íleggjarum, sum hevði boðið honum til Íslands at halda fyriulestur um fíggjarkreppuna, og hvat gerast skal. Morgunblaðið skrivar, at Gøran Persson plagar at taka 20.000 evrur fyri ein tílíkan fyrilestur, men fyri at vísa vælvild ímóti íslendingum tók hann einki fyri fyrilesturin. Fyrireikararnir rindaðu tí bara ferð og uppihald.



# Múrurin skal ikki verða innilokaður

Í áliti um Kirkjubømúrin, sum Múrnevndin og Føroya Fornminnissavn í felag hava gjørt, verður mælt til, at verndararbeiðið fer fram eftir altjóða etiskum leiðreglum, og at arbeitt verður fram ímóti, at mentanarminnini í Kirkjubø verða góðkend av alheimssamfelagnum sum heimsarvur. Eisini verður mælt til, at varðveitingararbeiðið verður skipað soleiðis, at óneyðugt verður at inniloka Múrin.

# Verkfalli hóttir sjúklingar

**Eitt stríð ímillum portørarnar í føroyska heilsuverkinum harðnar alsamt, men nú verður tann endaliga uppgerðin. Tað er nógv, sum bendir á, at næstan allir portørarnir fara í verkfall og tað fer at raka sjúklingar og heilsuverkið meint**

FAKFELAGSSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er stórur vandi fyri, at føroyska heilsuverkið aftur verður rakt av verkfalli.

Hetta kemur í kjalarvørrinum á, at stríðið ímillum portørarnar í heilsuverkinum alsamt harðnar.

Vandin fyri verkfalli hevur leingi ligið og lúrt.

Men nú er so lagt upp til eina endaliga uppgerð, har stórur vandi er fyri, at tað endar við, at nógv teir flestu portørarnir fara at leggja arbeiðið niður.

### Stríð um feløg

Hendan støðan er íkomin, eftir at ósemja fyri nøkrum mánaðum síðani tók seg upp ímillum portørarnir um, hvørjum fakfelag, teir skulu vera í.

Higartil hava portørarnir verið limir í Havnar Arbeiðsmannafelag og tað er eisini arbeiðsmannafelagið, sum hevur havt rættin at samráðst við fíggjarmálaráðið um sáttmála fyri portørarnar.

Men fyrr í ár tóku meginparturin av portørunum seg úr Havnar Arbeiðsmannafelag og meldaði seg inn í Starvsmannafelagið og kravdi harafturat, at Starvsmannafelagið fær samráðingarrættin.

### Hótta við verkfalli

Samstundis gjørdi Starvsmannafelagið greitt, at tað fór at krevja samráðingarrættin fyri portørarnar.

Og fyri at seta trumf á síni krøv, staðfesti Starvsmannafelagið, at tá ið sáttmálin um portørarnar fer úr gildi, skulu nýggjar samráðingar verða við Starvsmannafelagið og ikki við Havnar Arbeiðsmannafelag.

Samstundis gjørdi felagið greitt, at teir portørar, sum eru limir í Starvsmannafelag, fara ikki at kenna eg bundnar av einum nýggjum sáttmála, sum er gjørdur við Havnar Arbeiðsmannafelag

Tað merkir, at so fara allir portørarnir í Starvsmannafelagnum at leggja arbeiðið niður, hevur Starvsmannafelagið boðað púra greitt frá.

Sáttmálin um portørarnar fór úr gildi tann 1. oktober í 2007, men hann varð ikki uppsagdur og siðvenja er, at so leingi, ein sáttmáli ikki er uppsagdur, heldur hann fram.

Síðani hava Havnar Arbeiðsmannafelag og Fíggjarmálaráðið samráðst um at leingja sáttmálan, men tær samráðingarnar eru ikki komnar á mál enn.

Men nú hevur Havnar Arbeiðsmannafelag sagt sáttmálan upp frá 1.apríl.

Sostatt skal samráðast um nýggjan sáttmála, sum skal fáa gildið frá 1. apríl.

Og nú er tað, at knúturin kann verða so fastur, at tað endar við verkfalli.

### Virða samráðingarrættin

Snorri Fjallsbak, leiðari á fíggjardeildini í fíggjarmálaráðnum, sigur, at tey hava spurt Starvsmannafelagið, um tað stendur fast við kravið um, at nýggjur sáttmáli skal gerast við Starvsmannafelagið, annars verður verkfall.

Tann spurningin hava vit ikki fingið svaraðan enn, staðfestir leiðarin í lønardeildini.

Men hann staðfestir samstundis, at Havnar Arbeiðsmannafelagið hevur havt samráðingarrættin og tað virðir lønardeildin hjá fíggjarmálaráðnum.

- So leingi ein tann einasti portørur er eftir í Havnar Arbeiðsmannafelag, fer lønardeildin hjá fíggjarmálaráðnum at samráðast við arbeiðsmananfelag, sigur Snorri Fjallsbak.

Tað er eisini staðfest, at so verða hedur ongar samráðingar við Starvsmannafelagið, tí leiðarin á lønardeildini hevur áður staðfest fyri Sosialinum, at tað kemur ikki upp á tal, at samráðingar verða við fleiri feløg um eitt og sama sáttmálaøki.

Taka allir samlir portørarnir seg úr Havnar Arbeiðsmannfelag og melda seg inn í Starvsmannafelagið, er støðan ein onnur.

- So verður tórført at tvíhalda um, at Havnar Arbeiðsmannafelag skal varðveita samráððingarrættin, staðfestir Snorri Fjallsbak.

Hinvegin kann eisini staðfestast, at enn eru nakrir portørar eftir, sum eru limir í Havnar Arbeiðsmannafelag og sum ikki vilja skifta yvir í Starvsmannafelagið.



*Nú verður endaliga uppgerðin um portørarnar, og tað kann saktans enda við verkfalli*

*Savnsmynd*

# Standa fast við hóttan um verkfall

**Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag staðfestir, at ósemjan um portørarnar má fáa ein enda. Forkvinnan í Starvsmannafelagnum stendur fast við verkfallshóttan**

PORTØRAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit standa fast við, at Starvsmannafelagið skal hava samráðingarrættin fyri portørarnar, annars fara portørarnar, sum eru limir í Starvsmannafelagnum, ikki at kenna seg bundnar av einum nýggjum sáttmála.

- Annars fara portørarnar í Starvsmannafelagnum at leggja arbeiðið niður.

Tað staðfestir Selma Ellingsgaard, forkvinna

Hon sigur, at hetta er ikki eitt stríð við Havnar Arbeiðsmannafelag.

- Her er talan um, at nógv teir flestu portørarnar hava sjálvir vent sær til Starvsmannafelagið og hava biðið okkum røkja teirra áhugamál.

Hon sigur, at sostatt er hetta ein spurningur um at lata meirilutan ráða.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag staðfestir, at hóast sáttmálin er sagdur upp, merkir tað ikki, at felagið handar Starvsmannafelagnum samráðingarrættin.

- Vit hava framvegis samráðingarrættin og hann halda vit fast um, staðfestir hann.

Hann sigur, at Havnar Arbeiðsmannafelag fer ikki at gera sáttmála fyri einstakar portørar, men fyri alt økið, sum tað er, fyri at fáa øllum portørum so góðar sømdir, sum gjørligt.

Men hann staðfestir samstundis, at fyrr ella seinni má ósemjan um portørarnar fáa ein enda og tí er sáttmálin sagdur upp, so at tað kann koma til skarpskeringar.

- Vit kunnu ikki blíva við at draga hetta út, leggur hann afturat.